# ASFALT Í ANDLITUM



Tilkomna- og unga ættarliðið av listafólki hittast á Asfalt. Vinstru megin tann legendariski Hanus G. Johansen og til høgru ungi Eyðun Müller Thomsen, sum eigur myndirnar í erva á vegginum í Posthúskjallaranum

Mynd: Jan Müller



Ungur og heilt ungur áhoyrari til konsertina hjá Kaj Klein í Reinsarínum



Frans Arge Galán og Mikkjal G. Hansen úr SIC til konsertina hjá Kaj Klein



Finnur Jensen og Ísak Samleben úr Páll Finnur Páll til konsertina hjá Tinganest



Heðin Mortensen, borgarstjóri, og vinfólk í Futt-tjaldinum til Tinganest



Ungur ljóðmaður í Reinsarínum



Mótashowið hjá Spírum á Tjóðpallinum var ógvuliga gjøgnumført og vælvitjað



Fimm fittar frúir á asfaltinum á Asfalt



Fitt av fólki savnað til konsert í Tjóðpallinum



15 ára gamla Birita Poulsen var djørv og sang eitt lag eftir Eivør Pálsdóttir, og eigur unga vestmannagentan allan heiður fyri hetta val. Vakur sangur í Reinsarínum